# Sosialurin

Nr 55 mikudagur • 20. mars 2002 • 76. árgangur • Kr. 12,00

www.sosialurin.fo



Sigga, barnarithøvundur:

## Mjólkin kemur ikki frá lastbilinum

Síða 5



## Vestmenningur fer upp á Mount Everest

FJALLAKLINTRING

*Jan Müller*

– Eg havi droymt um hetta alt mítt lív – at verða fyrsti føroyingur uppi á heimsins hægsta fjalli Mount Everest, sigur 27 ára gamli vestmenningurin, Johnny Joensen, sum saman við nøkrum dønum er sloppin gjøgnum nálareygað at royna seg í Himmalaya. Fyrst skal hann klintra upp á tað 7129 metra høga Baruntse við lið Mount Everest, sum er 8848 metrar. Megnar hann tað er hetta sjálvt atgongumerkið til risan av øllum fjallarisum, Mount Everest. Johnny fer til Nepal í september og verður burturi í góðan mánað. Eftir tað verður so avgjørt, nær hann sleppur við uppá Everest. Tað er ein djarvur og treiskur vestmenningur, sum fer avstað. Hann er av fimastu monnum, fastur maður á 1. deild hjá VÍF, rør við Vestmenningi og er tiltikin fyri sína góðu kondition. Hann rennur í haganum við ryggsekki fullum av gróti og er millum fremstu vektlyftarar. Dagliga arbeiðir hann hjá Vest Pack. – Mær dámar ekstremar avbjóðingar og fari undir hesa uppgávu við øllum teimum menniskjansligu eginleikum, sum eg eigi. Vestmenningar, blaðið hevur tosað við, siga, at Johnny klárar hesa stóru avbjóðing. Lesið meira í morgin.




Javnaðarflokkurin sett skjøtil á valstríðið:

# Vallyfti fyri 116 mió krónur

**Javnaðarflokkurin hevur gjørt eitt valupplegg, ið greitt skal vísa veljaranum, hvat hann fær burtur úr at velja Javnaðarflokkin. M. a. bindir flokkurin seg til, at stovnað verða 160 røktarpláss, at pensjónirnar hækka munandi, at skipað útbúgvingarskeið verða til verkafólkið og at sjálvstýrismálið verður loyst við eini samveldisavtalu millum Danmark og Føroyar. Tilsamans kosta vallyftini 116 milliónir krónur. Tað heldur Jóannes Eidesgaard verða lítið í mun til, at sitandi samgonga hevur økt útreiðslurnar við 950 milliónum krónum farnu fýra árini**

Síða 16-17

SAMBANDSFLOKKURIN